


## KOMANDI TILTØK

12. – 15. apríl var Brúkararáðið hjá KT Landsins á vitjan.

Sendistovan skipar fyri flaggdagshaldi 25. apríl. Rigmor Dam, landsstýris-kvinna, flytur fram røðu

Sendistovan og Føroya Bjór skipa tann 25. apríl um kvøldið fyri einum føroyskum øl-smakkingar- og tónleikatiltaki

## FORSETIN STILLAR UPP AFTUR KORTINI

Hóast Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, í nýggjársrøðuni boðaði frá, at hann ikki stillaði uppaftur, so hevur hann nú gjørt av, at stilla upp. Íkomna politiska støðan hevur fingið hann at broytt meining.

> *» Síðan 1944 hevur Ísland einans havt fimm forsetar. Tann fimti forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, hevur verið forseti síðan 1. august 1996, tá hann tók við eftir Vigdís Finnbogadóttur, sum hevði verið forseti síðan 1. august 1980. Tey bæði hava sostatt verið evsti myndugleiki Íslands í samfull 36 ár, sum har afturat er helmingurin av tíðini síðan Ísland bleiv eitt sjálvstøðugt lýðveldi.«*

Valið verður 25. juni og tey sum ætla sær at stilla upp, skulu seinast boða frá áðrenn 21. mai. Higartil hava 15 valevni bjóðað seg fram, meðan fleiri møguligir uppstillarar ikki hava staðfest sína støðu enn. Men nú verandi forseti hevur boðað frá, at hann stillar uppaftur, hava nøkur valevni boðað frá, at tey ikki fara at stilla upp. Millum valevnini eru rithøvundar, fyrrverandi fótbóltsspælarar, politiskir formenn, skemtarar og stjórar.

Íslendska valskipanin fær eisini nøkur skot fyri bógvin. Til forsetaval er einans eitt valumfar, og tað valevni, sum fær flest atkvøður, verður sostatt forseti. Av tí at tað eru heili 15 valevni higartil, so er tað ein teoretiskur møguleiki fyri, at vinnarin einans skal hava 6,8% av atkvøðunum. At vera evsti myndugleiki landsins, og umboðandi eitt demokrati við einans 6,8% undirtøku, kann væl tykjast misvísandi, men soleiðis er skipanin skrúvað saman.

Annars eru krøvini fyri at kunna stilla upp sum forsetavalevni, at ein er 35 ára gamal, hevur atkvøðurætt í Íslandi og er íbúgvi í landinum. Harafturat krevst at ein savnar saman 1.500 undirskriftum og røkkur hesum fyri 28 mai.

Eygleiðarar meta, at Ólafur Ragnar Grímsson hevur góðar møguleikar at vinna komandi forsetaval.

## NÝGGJUR FORSÆTISRÁÐHARRI

Nýggjur forsætisráðharri gjørdist Sigurður Ingi Jóhannsson, næstformaður í Framsóknarflokkinum síðan 2013 og fyrrverandi landsstýrismaður í Fiskivinnu- og landbúnaðarmálum frá 2013-2016 og í Umhvørvis- og tilfeingismálum frá 2013-2014. Sigurður Ingi er 54 ár og er ættaður av suðurlandinum. Hann er útbúgvin djóralækni í Danmark og hevur fyrr starvast sum bóndi og sjálvstøðugur djóralækni. Politiskt hevur Sigurður Ingi royndir frá nevndararbeiði í ymiskum felagsskapum, har hann eisini hevur verið formaður fleiri ferðir.



*Mynd 1. Nýggi forsætisráðharri Íslands Siguður Ingi Jóhannsson*

## NÝGGJUR UTTANRÍKISRÁÐHARRI

Lilja Dögg Alfreðsdóttir, sum er útbúgvin innan altjóða búskap og stjórnmálafrøði, er vorðin nýggjur uttanríkisráðharri eftir at undanfarni uttanríkisráðharrin, Gunnar Bragi Sveinsson, gjørdist ráðharri í Fiskivinnu- og Landbúnaðarmálum.

Lilja Dögg Alfreðsdóttir er 42 ár og hevur eina drúgva fortíð innan bankavinnuna í íslendska Tjóðbankanum. Hon hevur verið limur í Framsóknarflokkinum í longri tíð, og hevur pápi hennara m.a. verið limur í býráðnum í Reykjavík, umboðandi Framsóknarflokkin. Hennara politiska fortíð, sum ein av fortalarunum fyri ES, kom beint í miðdepilin. Hon hevur fyrr úttalað seg um at Ísland skal uppí ES, men nú stuðlar hon afturtøkuni av umsóknini, sum Ísland hevði um limaskap í ES.



*Mynd 2. Nýggi úttanríkisráðharri Íslands Lilja Dög Alfreðsdóttir*

## Politiskan støðan

Panama-skjølini hava skakað íslendska samfelagið og møguliga er seinasta orðið ikki sagt í hesum máli. Hóast Ísland hevur fingið nýggjan forsætisráðharra og uttanríkisráðharra, so eru enn íslendskir borgarar nevndir í skjølunum, sum enn ikki eru almannakunngjørd. Hildið verður at áleið 600 íslendingar eru nevndir í skjølunum, sum er tað mesta fyri hvønn íbúgva í heiminum. Ein av orsøkunum til at so nógvir íslendingar eru at finna í skjølunum, kann væl vera av óvissu um virðið av íslendsku krónuni og vantandi áliti á bankakervið, sum hevur fingið fleiri til at flyta ognir á tryggari støð.



*Mynd 3. Ráðharrarnir í Ríkisstjórnini saman við forseta Íslands. Á myndini vantar Ólöf Nordal, innanríkisráðharri.*

Stjórnin hevur boðað frá, at hon fer serliga at leggja áherðslu á hesi mál fram til valið í heyst:

- Gjaldoyraviðurskiftini (ÍSK flóta meira frítt)
- Kapitaleftirlitið takast av
- Bústaðarmarknaðurin (gerast ódýrari at seta búgv hjá ungum fólkum)

Onnur mál kunnu eisini væntast. Fráboðað er, at valið verður í heyst. Frá tí at val verður útskrivað og til valið kann haldast, skulu ganga minst 45 dagar. Tí verður roknað við, at Altingið fær nógv at gera í summar.


### Samband

**Sendistova Føroya í Reykjavík**
Túngata 14
101 Reykjavík
+354 511 3200
reykjavik@tinganes.fo
www.tinganes.fo
Finn okkum á Facebook



Vilja svör frá Færeyingum

Virðast ekki hafa landað loðnu hér í samræmi við samninga

*Mynd 4. Grein á forsíðuni í Morgunblaðnum 30. mars 2016.*

## FØROYSK REIÐARÍ HALDA IKKI AVTALUNA UM LODNUVEIÐU

Íslendski skrivstovustjórin í Fiskimálaráðnum, Jóhann Guðmundsson, sigur, at føroysk reiðarí halda ikki avtaluna um lodnuveiðu. "Tað er torført at gera hetta mótvegis nærmastu grannum okkara, men hetta er eitt álvarsligt brot á semjuna millum tjóðirnar". Hann sigur, at sambært semjuni við føroyingar um lodnuveiðu í íslendskum sjógvi, so skulu føroysk fiskifør landa ¼ av veiðuni í Íslandi, um hon er veidd áðrenn 16. februar, og 2/3 av veiðuni, sum er veidd eftir 15. februar.

Jóhann sigur, at hóast føroyingar hava loyvi til at fiska 8.600 tons av lodnu, so hava teir einans landað 200 tons, hóast størsti parturin var veiddur eftir miðjan februar. Seinastu trý árini, hava føroyingar ikki landað tað, teir skuldu í Íslandi, og ringast hevur verið í vetur. Í alt hava føroyingar landað 11.500 tons í Føroyum, seinastu trý árini, sum teir áttu at havt landað í Íslandi. Sambært Jóhanni, so missa íslendingar áleið 26,5 mió. DKK í inntøkum.

Føroyingar hava tó loyvi til at tilvirka lodnuna eftir serligum ásetingum, men sambært Jóhanni, hava føroyingar ikki fylgt hesum ásetingunum. Íslendski aðalkonsulin hevur handað føroysku stjórnini eitt skriv frá íslendsku stjórnini. Har er málið lýst frá íslendskari síðu og føroyingar hava fingið møguleikan til at greiða frá sínum sjónarmiðum um hetta.

*Les meira her (á íslendskum)*




*Mynd 5 Sendimaðurin og borgarstjórin í Reyðafirði.*

## SENDIMAÐURIN VITJAR Á EYSTURLANDINUM

Í mars mánaða var sendimaðurin og vitjaði á eysturlandinum, sum ein liður í at gera Føroyar sjónligari í Íslandi og at finna fram til vinnuligar samstarvsmøguleikar millum londini bæði. Hesar kommunur og støð vórðu vitjaðar: Höfn (Björn Ingi Jónsson, borgarstjóri), Djúpivogur (Gauti Jóhannesson, borgarstjóri), Reyðarfjörður (Páll Björgvin Guðmundsson, borgarstjóri), Seyðisfjörður (Vilhjálmur Jónsson, borgarstjóri). Eisini nýtti sendimaðurin høvi til at vitja danska konsulin á eysturlandinum, Jónas Hallgrímsson, sum heldur til í Seyðisfirði. Jónas hevur í mong ár tikið sær av viðurskiftunum hjá Smyril-line í Seyðisfirði og kennir væl til føroysk viðurskifti. Endamálið við hesari vitjan var at fáa størri kunnleika til vinnuna o.a. á eysturlandinum.




*Mynd 6 Sendimaðurin á vitjan í Vopnafirði saman við borgarstjóranum.*

Síðani varð vitjað í Egilsstøðum (Björn Ingimarsson, borgarstjóra), í Vopnafirði (Ólafur Áki Ragnarsson, borgarstjóra), HB Grandi (ein av størstu fiskivunnufyritøkunum í Íslandi) í Vopnafirði og danska konsulin á norðurlandinum Helgi Jóhannesson, sum heldur til í Akureyri, ið eisini er stjóri fyri Norðurorka hf. (orkuveitari á norðurlandinum). Endamálið við at vitja danska konsulin var, at fáa betri innlit í vinnulívið o.a. á norðurlandinum til eina komandi vitjan har á staðnum.

Fundirnir við borgarstjórarnir vóru sera positivir og sendimaðurin fekk eina framúr góða móttøku. So at siga allir ynsktu at fáa størri vinnuligt samstarv við Føroyar og

samstarv í sínari heild, ikki minst tá ið ferðamøguleikarnir millum eysturlandið og Føroyar eru so góðir. Onkur býur hevði vinabý í Føroyum.

Sendistovan hevur fingið áheitanir og ynski um samstarv, sum arbeitt verður víðari við.

## SENDIMAÐURIN Á VITJAN Í FØROYUM



Í mars mánaða var sendimaðurin í Føroyum saman við sínum starvsfelagum í sambandi við árliga “Tiltak fyri sendifólkum og heimatænastuni”. Í hesum sambandi nýtti sendimaðurin høvi til at vitja fyritøkur og stovnar. Hesar fyritøkur vórðu vitjaðar: Føroya Bjór (Einar Waag, stjóri og Annika Waag, virkis- & góðskuleiðari), Havsbrún (Odd Eliasen, stjóri), HGV (Jákup Olsen, stjóri), Bakkafrost (Regin Jacobsen, stjóri), JT Electric (Rói Kalsø, stjóri og Rúni Petersen, framleiðsluleiðari), Visit Faroe Islands (Guðrið Højgaard, stjóri), Aðalkonsulát Íslands (Þórður Bjarni Guðjónsson, sendimaður), Spf Petur Nolsø, Rock Trawldoors (telefonfund við Hans J. í Líðini, stjóra), Smyril-line (Rúni Poulsen, stjóri), Kemilux (Debes Petersen, stjóri), Njord (Arni Carlsen, stjóri), SMS (Niels Mortensen, stjóri), Landsapotekarin (Kjartan Mohr, stjóri), Fróðskaparsetrið (Sigurð í Jákupsstovu, rektari og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri), Atlantic Airways (Jóhanna á Bergi, stjóri), KJ Hydraulik (Ólavur A. Olsen, stjóri og Jóannes Mørkøre, sølumaður – Ísland), Nevið (Eydnar á Roykheyggi, stjóri) og Hiddenfjord/Luna (Atli Gregersen, stjóri).

Á skránni til vitjanina hjá fyritøkunum vóru m.a. hesi evni: 1) Royndir við Íslandi hjá fyritøkuni, 2) Ynski/møguleikar á íslendska marknaðinum? 3) Hvat kann sendistovan gera fyri tykkum? Eisini hevði sendistovan eitt tilboð til fyritøkurnar um, at tær kundu leiga fundarhøli, skrivstovu í avmarkaðum tíðarskeiði og fundarsal til vinnulig átøk.

Fyritøkurnar vóru fegnar um vitjanina og vóru ikki allar greiðar yvir, hvat tær kundu nýta sendistovurnar til. Men eftir vitjanina var hetta greitt og vildu so at siga allar gera brúk av henni. Serliga vóru fyritøkurnar fegnar um, at tær kundu gera nýtslu av hølum hjá sendistovuni og fáa eina hjálpandi hond frá sendistovuni til teirra arbeiði, tá ið komið verður til Íslands.

Við hesum hevur sendistovan bjóðað seg fram til at veita føroysku vinnuni og stovnum tænastur, sum vónandi fer at vera gjørd nýtsla av. Ætlanin er, at halda fram við at vitja føroyskar fyritøkur og stovnar.